UPPGÁVUBÓK

Judit Højgaard, Katrin Matras Absalonsen og Súsanna Mørk Jóanesarson

Uppgávur til s. 7

1. Set runding um tað rætta.

	JA	NEI
Tummas og Annika hava fleiri onnur at spæla við.	K	T
Villingarválur er yvir av urtagarðinum hjá Tummasi og Anniku.	U	P
Í Villingaváli býr ein onnur familja.	J	M
Ongin býr í Villingaváli.	M	I
Annika og Tummas vilja spæla við onkran annan.	A	L
Tummas og Annika spæla fótbólt í urtagarðinum.	U	S

Rundingarnir geva						

2. Set í bókstavarað.

krokk spæla
børn Annika
Tummas stuttligt

Uppgávur til s. 8 og 9

3. Finn 10 navnorð á myndini.

4. Skriva navnorðini í uppgávu 3 í fleirtali.

Fleirtal	

5. Hvussu nógv sjálvljóð finnur tú? Set ein prikk undir hvørt sjálvljóð, tel tey og skriva rætt svar í puntin.

- Pippi er ræðuliga sterk og rík. ☐
- Hon ber sín stóra livandi hest. ☐
- Tann lítla fitta apan er Nilli. ☐
- Pippi hevur onga mammu og ongan pápa. ☐

Tilsamans eru ☐ sjálvljóð

6. Loys krossorðagátuna.



Uppgávur til s. 10 og 11

7. Být hesi orðini í

gera, pannukøka, kasta,
eta, egg, leggja,
siropskøka, apukattur,
baka, stova

Navnorð	Sagnorð

8. Skriva navnorðini í uppgávu 7 í fleirtali.

Fleirtal

9. Skriva sagnorðini í uppgávu 7 í tátíð.

Tátíð		
Í gjár		hann/hon
Í gjár		hann/hon
Í gjár		hann/hon
Í gjár		hann/hon
Í gjár		hann/hon

10. Orð at stava.

	Stavilsi	Sjálvljóð	Skriva orðið
pannukaka			
loft			
brotið			
eggjareyði			
hundrað			
svalanum			
rossahúsinum			
Annika			

11. Set rætt orð inn – síða 11 regla 3.

Eitt brotið _____ er í _____ á Pippi. Tað kom har, tá ið hon _____ _____ pannukakudeiggið. Men _____ leggur _____ í _____.

- Eg havi _____ hoyrt, at eyggjareyði _____ vera góður fyri _____, sigur hon. Vita bara, nú _____ tað at _____, so tað _____ í.

Uppgávur til s. 12 og 13

12. Svara spurningunum. Skriva heilar setningar.

Hvat dugir Pippi, sum nógv onnur ikki duga?

Hvussu etur Pippi?

Hvat dámar Pippi væl?

Hvussu vaskar Pippi køksgólvið?

Hvussu nógv sprek høggur hon í senn?

Hví má Pippi reinsa skorsteinin?



13. Tekna nakrar myndir av tí Pippi ger sjálv. Tú kanst finna uppá sjálv/ur.

14. Finn eitt navnorð og eitt sagnorð á hvørjari mynd.



Uppgávur til s. 14 og 15

15. Leita eftir orðunum.

H	D	F	B	Y	K	L	U	P	L	S
Á	E	F	B	D	Á	B	U	D	P	Á
L	G	Æ	L	Ø	P	F	T	S	V	P
S	K	R	I	V	I	B	Ó	K	A	U
B	F	N	K	M	P	K	Á	H	N	B
A	D	R	K	H	P	R	E	Ø	N	L
N	M	Y	L	E	I	A	S	I	I	Ø
D	P	T	U	M	M	A	S	Ú	K	Ð
J	L	J	Æ	T	R	I	L	L	A	R
O	Ó	G	T	E	A	S	V	Ý	S	A
U	T	R	Æ	S	T	U	B	B	I	K

Vatnrætt →

Tummas

skrivibók

trilla

træstubbi

Loddrætt ↓

Annika

blikk

hálsband

sápubløðra

Pippi

16. Set runding um tað rætta.

	JA	NEI
Pippi, Tummas og Annika eru leitarar.	A	T
Pippi finnur eina súkklu.	U	N
Pippi finnur eitt rustað blikk.	N	M
Annika finnur eitt reytt skeljahálsband.	I	U
Pippi finnur bert eitt rustað blikk.	A	K
Tummas finnur eina skrivibók.	A	S

Rundingarnir geva						

17. Hvør eri eg?

Eg havi eingi systkin.

Eg eigi nógvar pengar.

Eg havi reytt hár.

Eg eigi eina apu og ein hest.

Eg eiti					

Eg havi langan hala.

Eg elski at klintra.

Eg elski at hjálpa Pippi.

Eg eiti					

Uppgávur til s. 16 og 17

18. Finn veg gjøgnum villiniborgina.



Loysn								

19. Orð at stava.

	Stavilsi	Sjálvljóð	Skriva orðið
Pippi			
Tummas			
Annika			
sirkus			
gullpengar			
framsýning			

20. Set rætt orð inn – síða 17 regla 1.

Hon _____ gjarna hava _____ sjálv eisini. Tí Pippi dugir _____. Sirkusstjórin _____ so _____. Og gentan, sum _____ at _____ á línu, _____ eisini _____. Men fólkini í _____ rópa "koyr á, _____."

21. Set rættan bókstav í rættan rút.

Eg havi reytt hár.
Eg eri ein genta.
Eg havi eina flættu.

Eg havi reytt hár.
Eg eri í keppi.
Eg vinki.

Eg eri í stríputtum buksum.
Eg eri í hatti.
Eg eri illur.

Eg eri í stríputari skjúrtu.
Eg havi ein stav.
Eg havi langt skegg.



Uppgávur til s. 18 og 19

22. Hvørji av hesum orðunum verða skrivað við stórum?

pippi, húsið, apa, annika,
villingaválur, hestur, fólkini,
sirkusgenta, sterki adolf, verður,
høvdinum

23. Set runding um tað rætta.

	JA	NEI
Pippi torir ikki at standa á hestinum.	K	S
Pippi dettur av hestinum.	U	I
Sterki Adolf er sterkasti maður í verðini.	R	M
Sterki Adolf er sterkari enn Pippi.	M	K
Pippi tveitir Sterka Adolf upp í loft.	U	L
Sirkusstjórin tveitir Pippi út úr sirkusinum.	U	S

Rundingarnir geva						

24. Finn veg gjøgnum villiniborgina.



Loysn													

Uppgávur til s. 20 og 21

25. Finn fimm feilir á høgru mynd. Set ring um feilirnar og skriva teir í kassarnar niðanfyri.

26. Skriva tað mótsetta.

eingin	
myrkur	
nátt	
sterk	
skjótt	
stuttligt	
gráta	

27. Svara spurningunum. Skriva heilar setningar.

Hvussu svevur Pippi?
Hvar svevur Nilli?
Hvussu eita tjóvarnir, sum ætla at stjala frá Pippi?
Hvat ætla teir at stjala?
Hvar tveitir hon tjóvarnar?
Hvat gevur Pippi teimum, áðrenn teir fara?



© NÁM

Uppgávur til s. 22 og 23

Pippi dugir ikki so væl at stava, tí hon gongur ikki í skúla sum onnur børn. Hjálp Pippi at stava rætt.

28. Skriva orðini rætt.

Tmas o Anika sklu koma í føjingardæ kjá Pippi í morr seidnapartin. Klæji: kvæt tit vilja.

TIL LUKKU PIPPI

29. Skriva eina innbjóðing til onkran, sum tú kennir.

Uppgávur til s. 24 og 25

30. Finn fimm navnorð av hvørjum kyni og skriva tey í kassan.

Kalkyn	Kvennkyn	Hvørkikyn

31. Hygg at myndini á s. 24 og 25 og set røttu orðini inn.

Navnorð

Tríggjar krukkur standa á einari_____.

Nilli hevur ein _____ á høvdinum.

Við síðurnar av vaskinum stendur ein _____.

Sagnorð

Pippi_____ við spælidósina.

Á vegginum _____ myndir.

Annika _____ hestinum ein sukurmola.

Lýsingarorð

Tummas heldur í einum_____ koppi.

Hurðarnar í _____ skápinum eru opnar.

Á borðinum stendur _____ matur.

Uppgávur til s. 26 og 27

32. Být hesi orðini í:

smá, hestur,
kommoda, gult,
hattahill, stríput, fínt,
stólur, merkiligt, borð

Navnorð	Lýsingarorð

33. Skriva navnorðini í uppgávu 32 í fleirtali.

Fleirtal

_____

_____

_____

_____

34. Orð at stava.

	Stavilsi	Sjálvljóð	Skriva orðið
hestur			
kommoda			
gult			
hattahill			
stólur			

35. Finn øll tvíljóðini á síðu 27.

Har vóru _____ ei

Har vóru _____ ey

Har vóru _____ oy

Uppgávur til s. 28

36. Hvussu nógv sjálvljóð finnur tú? Set ein prikk undir hvørt sjálvljóð, tel tey og skriva rætt svar í puntin.

- Føðingardagurin var stuttligur. ☐
- Tummas og Annika eru so góð við Pippi. ☐
- Nú er føðingardagurin liðugur. ☐
- Pippi og Nilli siga farvæl. ☐

Tilsamans eru 43 sjálvljóð

37. Set í bókstavarað.

Tummas	liðug
Nilli	heim
spæla	tey

Fyrisøgn 1

Staviorð

góð
krokk
stuttligt
onkran
børn
sterk
eigur
glað

Tummas og Annika eru tvey fitt og góð børn.

Tey spæla krokk, og tað er stuttligt.

Tey vilja spæla við onkran annan, men har eru eingin børn.

So kom Pippi. Hon er sera sterk og rík.

Hon ber ein hest og eigur eina apu.

Nú eru Tummas og Annika glað.

Tey fara at spæla við Pippi.

1. Setið prikk undir øll sjálvljóðini og tvíljóðini.
2. Lesið øll sjálvljóðini og tvíljóðini í felag.
3. Lesið fyrisøgnina í felag.
4. Lesið upp á staviorðini heima.
5. Skrivið fyrisøgnina í skriviheftið.

Fyrisøgn 2

Staviorð

sjálv
flættar
vaskar
elskar
oyruni
gólv
baka
smakkar
hjálpir

Pippi ger alt sjálv. Hon flættar sær.

Hon vaskar sær, og hon elskar at fáa vatn í oyruni.

Pippi vaskar eisini gólv sjálv.

Pippi elskar at baka. Hon bakar alt sjálv.

Tummas og Annika eta frá Pippi.

Tey halda, at tað smakkar so væl.

Pippi missir nógv á gólv, tá ið hon bakar.

Nilli hjálpir henni at baka.

1. Setið prikk undir øll sjálvljóðini og tvíljóðini.
2. Lesið øll sjálvljóðini og tvíljóðini í felag.
3. Lesið fyrisøgnina í felag.
4. Lesið upp á staviorðini heima.
5. Skrivið fyrisøgnina í skriviheftið.

© NÁM

Fyrisøgn 3

Staviorð

sirkus
fólk
genta
klappa
sterkur
einki
lítlari

Pippi og hini fara í sirkus. Har eru nógv fólk.
Ein genta stendur á einum hesti.
Tað vil Pippi eisini, og øll klappa fyri henni.
Pippi vil eisini vinna á Sterka Adolfi, sum er sera sterkur.
Tað klárar hon sum einki, og øll klappa aftur fyri henni.
Tá Pippi kemur heim, fer hon í song.
Nilli svevur í eini lítlari song

1. Setið prikk undir øll sjálvljóðini og tvíljóðini.
2. Lesið øll sjálvljóðini og tvíljóðini í felag.
3. Lesið fyrisøgnina í felag.
4. Lesið upp á staviorðini heima.
5. Skrivið fyrisøgnina í skriviheftið.